# ítróttur

Nr. 22 • fríggjadagur • 1. februar 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo


# Eitt stórt herðaklapp

**Hóast teir báðir, Hannis og Uni Wardum, hava bert dømt í bestu deildini í hálvt ár, so hava teir longu fingið tillutað fyrsta finaludystin, og hetta halda teir vera eitt stórt herðaklapp frá Hondbóltssambandinum**

COCA-COLA KAPPINGIN
*Jákup Mørk*

Fyrr í vikuni boðaði Hondbóltssambandið frá, hvørji dómaraparini til finaludystirnar í Coca-Cola kappingini í hondbólti skulu vera.

Ofta er dómaraásetingin í slíkum dystum eitt herðaklapp til tey pør, sum hava staðið seg serliga væl í kappingarárinum, og í so máta tykist eingin broyting at vera í politikkinum hjá HSF.

**Finalu eftir hálvt ár**
Hjá monnunum verða tað nevnliga brøðurnir, Hannis og Uni Wardum, sum skulu døma finaludystin, og tað fær illa verið annað enn eitt stórt herðaklapp, tá hugsað verður um, at teir bert hava hálvt ár á baki sum dómarar í fremstu deildini.

- Vit taka tað í øllum førum sum eitt stórt herðaklapp, nú vit verða settir at døma ein somikið týdningarmiklan dyst, sigur eldri beiggin, Hannis.

Spurdur, um hann heldur tað vera ein fyrimun hjá teimum, at teir eru beiggjar, sigur Hannis, at tað er tað heilt víst.

- Sjálvandi hava aðrir dómarar eitt tætt samband, og skulu kenna hvønn annan, men hjá okkum hevur ikki verið neyðugt at arbeitt við hesum. Vit vita alla tíðina, hvar vit hava hvønn annan, og fær ikki verið annað enn ein stórur fyrimunur.

- At byrja við var enntá líkt til, at HSF hevði sett okkum at døma báðar finalurnar, men har hevði talan verið um eina misskiljing, tí tað hevði avgjørt verið ov nógv av tí góða. Tað er jú vónleyst at halda konsentratiónini fult uppi í nærum fýra tímar. Ikki minst um talan verður um tveir javnar dystir.

**Drúgvar finaluroyndir**
Hvørki hann ella yngri beiggin hava áður dømt finaludyst í steypakappingini, men hetta merkir ikki, at teir eru heilt uttan royndir. Hvørki sum dómarar ella sum leikarar í finaluhøpi.

- Sum dómari dømdi eg hampuliga nógv saman við Dia (Midjord, blóm.) í 80'unum, men eg haldi ikki, at vit dømdu nakra steypafinalu. Tá spældu vit næstan altíð við í finaluni, sigur hann flennandi.

Tað kann eisini leggjast afturat, at seinasti dysturin hjá Hannis í fyrstu deild júst var ein steypafinala. Tað var, tá Kyndil fyri nærum akkurát tveimum árum síðani vann eina sera spennandi finalu ímóti Neistanum, eftir at Neistin annars hevði verið á odda mest sum allan dystin.

Hannis skeyt tá seinasta málið í dystinum, men júst hetta vísti seg at gerast seinasta skot hansara fyri Kyndil. Onkursvegna gekk ryggurin fyri í skotløtuni, og í dag er hondbólturin so avmarkaður til dómarayrkið og onkra hugnaløtu á triðju deildarliðnum hjá Kyndli.

**Fyrireikingarnar**
Eins og spælararnir, so eru dómararnir sjálvsagt spentir uppá, hvussu finaludystirnir fara at spæla av, og tí eru fyrireikingarnar í stóran mun líkar teimum sum leikararnir hava.

- Tað ljóðar kanska eitt sindur býtt, men tú mást vera væl fyri. Tíðliga í song, góðan mat og so framvegis. Her er tað einki øðrvísi í mun til tað at vera spælari.

- Taktik-fund halda vit ikki, men vit tosa sjálvandi saman um, hvørjar støður møguliga kunnu íkoma og hvussu vit eiga at taka hesar.

- Og at enda, so má eg eisini siga, at eg rokni tað fyri ein sera stóran fyrimun, at teir báðir, Hjalmar og Kristian, vera við dómaraborðið. Haðani kunnu teir vera okkum til stóra hjálp, um eitthvørt er áfatt, ella um vit ivast í onkrum, so tað er einki at ivast í, at talan her er um ein stóran fyrimun hjá okkum, sigur ein spentir Hannis Wardum at enda.

*- Sjálvandi hava aðrir dómarar eitt tætt samband, og skulu kenna hvønn annan, men hjá okkum hevur ikki verið neyðugt at arbeitt við hesum. Vit vita alla tíðina, hvar vit hava hvønn annan, og fær ikki verið annað enn ein stórur fyrimunur, heldur Hannis Wardum um tað, at døma saman við beiggja sínum*

# Fernandez til AB

*Heine Fernandez hevur seinasta árið spælt við FCK, men í dag skrivar hann undir tvey-ára sáttmála við AB*

**Álopsfelagin hjá Toda skrivaði mikudagin undir tvey-ára sáttmála við AB**

SUPERLIGA
*Jákup Mørk*

Hetta upplýsir FCK í stuttum tíðindaskrivi.

Heine Fernandez kom fyri einum ári síðani til høvuðsstaðarfelagið, har hann gjørdist danskur meistari í fyrstu royndini, og stóran part av tíðini hevur hann verið fastur fúsur á liðnum.

Av og á hava illstøður staðist millum bersøgna áleyparan og líka so bersøgna ítróttastjóran í felagnum, Niels Christian Holmstrøm, og hugsast kann, at hetta hevur havt sína ávirkan, uttan at nakað verður nevnt um hetta í tíðindaskrivinum.

Leiðslan hjá FCK sigur, at FCK hevur sáttmála við Fernandez til komandi summar, men til ta tíð er áleyparin vorðin 36 ára gamal, og halda bæði leiðsla og leikari tí, at tilboðið frá AB er ov gott at siga nei-takk til.



# Hava funnið støðið

*Eftir at felagið í nøkur ár ikki hevur havt nøkur góð fíggjarlig úrslit at vísa á, gav samlaði raksturin í HB eitt fitt yvirskot í ár, sigur formaðurin í felagnum, Birgir Enghamar*

**Raksturin í felagnum er nú komin á tað støðið, sum verður mett sum forsvarligt, tá talan er um rakstur av einum fótbóltsfelag**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Farna vikuskifti hevði HB aðalfund. Tað vil siga, at bæði Havnar Bóltfelag og P/F Havnar Fótbóltur, sum rekur besta mansliðið í felagnum, høvdu boðið limum sínum niðan.

**Nevndin víðkað**
Birgir Enghamar, sum er formaður í móðurfelagnum, sigur, at talan yvirhøvur var um ein sera síðiligan fund.

– Har vóru eini 90 fólk møtt, og hóast tað talið partvíst komst av, at venjingin var avlýst og at leikarar tí vóru við á fundi, so má tað sigast at vera hampuliga góð uppmøting.

– Okkurt uppskot var um broytingar í bygnaðinum, og hetta varð uttan stórvegis hóvasták samtykt. Í stuttum er broytingin tann, at formaðurin í HB nú eisini er nevndarformaður í partafelagnum, og so eisini, at nevndin nú er víðkað, soleiðis at hon í dag telur seks limir.

Tað merkir so, at Birgir Enghamar er nýggjur nevndarformaður í partafelagnum, meðan Kaj Leo Johannesen, sum áður hevur røkt hendan sessin, nú er vanligur nevndarlimur.

Annars vórðu allir limirnir í nevndunum báðum afturvaldir. Í nevndini fyri HB eru sostatt Birgir Enghamar, formaður, Jan Falkenberg Jensen, varaformaður, Niels Juel Arge, skrivari, Petur Ove Kruse Johannesen, kassameistari, og Finn Ludvig. Tiltakslimir eru Elin Christiansen og Sámal Hansen.

Í P/F Havnar Fótbóltur er nevndin, sum altso er víðkað til seks limur, samansett soleiðis: Birgir Enghamar, formaður, Høgni Mikkelsen, Kaj Leo Johannesen, Niels Christian Nolsøe, Øssur Sørensen og Jan Gaard Joensen.

**Raksturin tillagaður**
Ein partur – og tað er kanska hin mest forvitnisligi hjá almenninginum – av rakstrinum av enum fótbóltsfelag, er sjálvandi fíggjarligi parturin. Og eftir nøkur ár við alt annað enn góðum úrslitum, tykist tað nú soleiðis, at elsta høvuðsstaðarfelagið hevur funnið rætta stevið.

Sjálvur vil formaðurin ikki siga nakað um, hvussu tað hilnaðist einstøku pørtunum av felagnum, men hann sigur tó somikið, at tá alt verður lagt saman, so mól tað væl og virðiliga runt.

– Sum so er tað ikki serliga áhugavert fyri okkum, hvat einstaki parturin av heildini gevur. Vit síggja tað soleiðis, at HB er sett saman av Havnar Bóltfelag, HB-stuðlum, og P/F Havnar Fótbóltur, og samanlagt góvu hesi eitt fitt avlop, uttan at eg fari at seta nøkur tøl á, sigur Birgir.

Undir øllum umstøðum, so merkir hetta, at hóast ítróttarligu avrikini ikki stóðu mát, um hugsað verður um fyrstu deild í mansfótbólti, so hevur felagið nátt teimum fíggjarligu málum, sum vórðu sett fyri einum ári síðani.

Tá var talan um eitt hampuliga stórt hall, og her í blaðnum endurgóvu vit táverandi nevndarformannin, Kaj Leo Johannesen, fyri at siga, at tað úrslitið var væntandi, men at raksturin í 2001 skuldi tillagast, so talan skuldi gerast um yvirskot.

– Tað er akkurát tað, sum vit hava gjørt. Pengar eru eitt lutfalsliga nýtt fyribrigdi í føroysum fótbólti, og tað hevur kanska tikið sína tíð at finna útav, á hvørjum støði vit kunnu reka hetta forsvarligt, men nú meta vit so, at vit hava funnið rætta leistin til hetta, sigur Birgir Enghamar at enda.

# Jákup helt nullinum

**Norska Molde spældi mikudagin málleysan javnleik móti Malaga úr bestu sponsku deildini**

NOREG
*Jákup Mørk*

Saman við liðfeløgunum úr Molde er Jákup Mikkelsen farin undir fyrireikingarnar til komandi kappingarárið.

Í løtuni er liðið á venjingarlegu í Spania, og har høvdu teir mikukvøldið eina stóra uppgávu, tá teir skuldu royna seg móti Malaga, sum í løtuni er á 11. plássi í bestu sponsku deildini, og hava teir fyri stuttum tikið stig frá oddaliðnum, Real Madrid.

Tað eydnaðist tó Molde at spæla ein málleysan 0-0 javnleik, og úr einum føroyskum sjónarhorni var hugaligt at staðfesta, at Jákup Mikkelsen var á vøllinum í samfullar 90 minuttir.

Tað hevur annars tykist eitt sindur ivasamt við lagnuni hjá føroyska landsliðsmálverjanum, tí hóast hann hevur longt sáttmálan við Molde, so er kappingin um málverjasessin sera hørð, nú felagið hevur keypt evnaríka svian, Eddie Gustafsson.

Hesin mátti tó taka til takkar við beinkinum hesaferð, og hóast talan bert er um venjingarlegu og hóast sviin ivaleyst eisini fer at byrja í øðrum dystum á ferðini, so man tað á ongan hátt telja niðureftir hjá Jákupi, at hann helt málið reint í fyrstu royndini á ferðini.

# Klaksvíkin til Havnar

**Ætlandi hevur Stjørnan hópin av áskoðarum við, tá kvinnurnar fara at spæla steypafinalu leygardagin**

Í ítróttarhøpi munnu tað vera fægstu feløgini, sum hava eins trúgvar áskoðarar, sum tey í Klaksvík hava.

Ferð eftir ferð hevur hetta givið seg til kennar, tá lið úr Klaksvíkini hava spælt týdningarmiklar útidystir, og í so máta tykist hondbóltsfelagið ikki at vera nakað undantak.

Fyri at lætta um, hevur Stjørnan á heimasíðuni, www.ki-klaksvik.fo, boðað frá, at felagið skipar fyri bussferð til steypafinaluna.

Ferðin er samskipað við túrin hjá Dúgvuni av Klaksvík kl. 13.00, og er kostnaðurin fyri ferðina 50 kr. Tekning eigur at fara fram á Kunningarstovuni.

-jm

# Tórshavn Open

**Um vikuskiftið fara børn og vaksin at kappast í sonevndu Tórshavn Open kappingini í badminton**

BADMINTON
*Jákup Mørk*

Árliga kappingin hjá Havnar Badmintonfelag verður leikt í Badmintonhøllini um vikuskiftið.

Talan er um einstaklingakapping fyri bæði børn og vaksin. Børini spæla leygardagin, og leggja tey yngstu fyri klokkan 10.30. Børn 11-13 ár byrja kl. 13.00, meðan tey 13-15 ára gomlu byrja kl. 15.30.

Sunnudagin spæla unglingar og vaksin, og tá verður byrjað kl. 13.00. Tey bæði fremstu í øllum aldursbólkum fáa steyp til ognar, og hartil spæla tey vaksnu eisini um ferðasteyp.